## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og eitt skifti regn. Út á seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri, út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin um 6 stig. Sunnudagin minkandi vindur av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátakavi. Hitin um 3 stig.

# ES-tilgongd kann byrja í morgin



**Vitjanin í morgin hjá Per Stig Møller, uttanríkisráðharra, er eitt gylt høvi hjá landsstýrismanninum í uttanlandsmálum at byrja tilgongdina, har Føroyar og Danmark í felag finna eina smidliga loysn á føroyska ES-spurninginum, heldur Edmund Joensen, fólkatingsmaður**

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í morgin er ein lagalig løta hjá landsstýrinum at byrja tilgongdina at vinna Føroyum eitt pláss í Europasamveldinum.

Upplagda høvið at fáa ES-spurningin veruliga á dagsskrá er vitjanin hjá danska uttanríkisráðharranum, Per Stig Møller. Tað heldur Edmund Joensen, fólkatingsmaður.

- Føroyar hava brúk fyri at gerast partur av ES. Tað vil stimbra samstarvið suðureftir, og handilin við fyritøkur og kundar á europeiska marknaðinum økist. Harvið kunnu vit økja inntøkurnar til Føroya, sigur Edmund Joensen.

Hann mælir til, at landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum longu í morgin fer í samrøður við uttanríkisráðharran um leistin fyri, hvussu Føroyar og Danmark í felag kunnu finna eina góða og smidliga loysn á føroyska ES-spurninginum.

- Nógv virda ES-landið Danmark hevur góðar lyklar til ES-dyrnar, og gjøgnum Ríkisfelagsskapin kunnu vit saman lata dyrnar upp. Júst hetta eigur at vera fokus hjá landsstýrismanninum í morgin, sigur Edmund Joensen.

- Seinastu fimm mánaðirnar hevur landsstýrismaðurin brúkt stóra orku upp á at skunda sær spakuliga. Samstundis er Ísland á veg inn í ES. Vit mugu tí sanna, at Landsstýrið hevur ligið besta sjóvarfallið av sær. Nú má handling til frá føroyskari síðu, og í morgin er møguleiki at koma á rætta sporið, sigur Edmund Joensen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -1 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 8 |
| Malta | 10 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 980 hPa. eystan fyri Hvarvið fer norðureftir og dýpist.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur í stað og kuldabrúgvin haðani kemur móti Føroyum mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/02 kl. 06⁰⁰ – 16/02 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,7°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 13,0 mm – mált frá 10/02 kl. 06⁰⁰ – 11/02 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 85 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

16.februar Seinna kvarter
19.februar Mánin longst frá jørðini
25.februar Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. feb. | 0:43 | 13:21 | - | 12:21 | - | 12:36 | 2:43 | 15:21 | 3:43 | 16:21 | 11:36 | - | 10:36 | 23:00 | 0:58 | 13:36 | 1:58 | 14:36 | 0:28 | 13:06 | 1:43 | 14:21 |
| 18. feb. | 1:45 | 14:10 | 0:45 | 13:10 | 1:00 | 13:25 | 3:45 | 16:10 | 4:45 | 17:10 | 0:00 | 12:25 | 11:25 | 23:50 | 2:00 | 14:25 | 3:00 | 15:25 | 1:30 | 13:55 | 2:45 | 15:10 |
| 19. feb. | 2:35 | 15:00 | 1:35 | 14:00 | 1:50 | 14:15 | 4:35 | 17:00 | 5:35 | 18:00 | 0:50 | 13:15 | - | 12:15 | 2:50 | 15:15 | 3:50 | 16:15 | 2:20 | 14:45 | 3:35 | 16:00 |
| 20. feb. | 3:22 | 15:45 | 2:22 | 14:45 | 2:37 | 15:00 | 5:22 | 17:45 | 6:22 | 18:45 | 1:37 | 14:00 | 0:37 | 13:00 | 3:37 | 16:00 | 4:37 | 17:00 | 3:07 | 15:30 | 4:22 | 16:45 |
| 21. feb. | 4:07 | 16:29 | 3:07 | 15:29 | 3:22 | 15:44 | 6:07 | 18:29 | 7:07 | 19:29 | 2:22 | 14:44 | 1:22 | 13:44 | 4:22 | 16:44 | 5:22 | 17:44 | 3:52 | 16:14 | 5:07 | 17:29 |